Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.05.2026 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Hanna Jensen |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 31/26 | 25/00535-5 | Umsókn um loyvi at keypa jørð - matr. nr. 281a í Syðrugøtu (Undir Gøtueiði) | 2 |
| 32/26 | 26/00039-5 | Stuðul til ítrott - Reysti 2026/2027 | 4 |
| 33/26 | 26/00131-2 | Roknskapur 2025 | 6 |
| 34/26 | 26/00225-2 | Eykajáttan apríl 2026 - 26/00225 | 8 |
| 35/26 | 26/00255-3 | Nýggj moldgoymsla - matr. nr. 335 í Syðrugøtu | 10 |
| 36/26 | 26/00083-3 | Umsókn um loyvi at keypa ískoytisstykki - Leggja ag aftrat 319 í Leirvík | 12 |
| 37/26 | 26/00229-2 | Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 120 í Syðrugøtu | 15 |

**Til viðgerð:**

## 31/26 Umsókn um loyvi at keypa jørð - matr. nr. 281a í Syðrugøtu (Undir Gøtueiði)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.05.2026 | 16/26 | 25/00535-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 23/26 | 25/00535-5 |
| 3 Býráðið | 27.05.2026 | 31/26 | 25/00535-5 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av parti av matr. nr. 281a undir Gøtueiði.

Umsøkjarin, ið eigur matr. nr. 311 undir Gøtueiði, hevur søkt um at keypa 718,9 fermetrar av matr. nr. 281a við tí endamáli at leggja økið afturat matr. nr. 311, soleiðis at samlaða víddin á matriklinum verður 1.055,9 fermetrar.

Eysturkommuna hevur upplýst umsøkjaranum, at sambært kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn skulu allar ognir, ið eru størri enn 300 fermetrar, bjóðast út til almenna sølu.

Harumframt varð upplýst, at talan er um øki, ið sambært galdandi ásetingum er lagt út til bústaðarendamál, har einans vinnuligt virksemi innan umhvørvisflokk 1 er loyvt.

Eysturkommuna bað eisini umsøkjaran greiða frá ætlanunum við økinum, soleiðis at kommunan kundi taka støðu til málið á haldgóðum grundarlagi.

Umsøkjarin hevur síðani latið inn dagførdar tekningar, har umsøkta økið er minkað úr 718,9 m² niður í 595 fermetrar. Sambært tekningunum er ætlanin at byggja bilhús á økinum.

Tað skal tó staðfestast, at økið framvegis er størri enn 300 fermetrar og tí, sambært kunngerð nr. 122 um alment útboð av kommunalari fastogn, skal leggjast út til almenna sølu.

**Skjøl í málinum:**

- Umsókn um keyp av jørð frá matr. nr. 281a Syðrugøtu
- 25_00535-1 – Umsókn um keyp av jørð frá matr. nr. 281a Syðrugøtu

- Tekningar – Umsókn um keyp av lendi undir Gøtueiði

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir frá at selja 595 fermetrar av parti av matr. nr. 281a undir Gøtueiði, við tað at økið sambært kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn eigur at verða lagt út til almenna sølu. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 20. maj 2026</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Fíggjarnevnd 22. mai 2026</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnendini

**<u>Býráðið 27. mai 2026</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin og fíggjarnevndini

## 32/26 Stuðul til ítrott - Reysti 2026/2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.05.2026 | 30/26 | 26/00039-5 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 24/26 | 26/00039-5 |
| 3 Býráðið | 27.05.2026 | 32/26 | 26/00039-5 |

**Málslýsing:**

Umsøkjarin hevur sent soljóðandi umsókn:

«...ynskja vit at søkja um stuðul til Svimjifelagið Reysta fyri kappingarárið 2025/26. Svimjifelagið hevur í hesum kappingarárið eitt limatal sløk 100 børn í aldrinum 6 til 11 ár. Svimjifelagið ynskir, at vera ein tryggur fealgsskapur fyri børn og ung í Eysturkommunu, har vit bæði menna kropsliga heilsu og skapa ein sunnan felagsskap rundan um ein sunt felag. Við tí stuðlinum vit søkja um, kunnu vit skapa eina betri og tryggari venjing og geva børnunum møguleikan, at røkka sínum ítrottarligum málum.

Stóra limatalið og ynskir um betri útgerð og umstøður, ger tykkara stuðul til ein fyritreyt fyri framhaldandi menning av børnunum í okkara kommunu.

Mál fyri framtíðina:
- Seta høvðusvenjara
- Hava fleiri kappingarlið og harvið eisini fleiri venjinga tíðir
- Hava eina greiða venjingarætlan fyri allar svimjarar í felagnum

Raksturin at reka felagið, kemur primert av hesum punktum:
- Venjarar fáa eina samsýning fyri at venja børnini
- Kappingar hava ymiskar kostnaðir tengdar at sær, so sum ferða útreiðslur, mat o.a.
- Dagføring av venjingarútgerð.
- Felagstiltøk í stimbra um felagsskapin. «

Roknskapurin er viðfestur málinum.

Umbiðin upphædd: 125.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 650.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, "Stuðul til ítrott". Herav eru per d.d. 510.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

Mælt verður til at veita stuðul uppá 100.000 kr.

**<u>Mentanarnevndin 20. mai 2026</u>**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla svimjifelagnum Reysta við 100.000 kr.

**<u>Fíggjarnevnd 22. mai 2026</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**<u>Býráðið 27. mai 2026</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

## 33/26 Roknskapur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 25/26 | 26/00131-2 |
| 2 Býráðið | 27.05.2026 | 33/26 | 26/00131-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.05.2026 | 29/26 | 26/00131-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður tiil fyriliggjandi roknskap:

Høvuðstølini eru hesi:

| | |
|---|---|
| **Inntøkur íalt** | **158.115.000,00** |
| | |
| Rakstrarútreiðslur | 135.009.000,00 |
| Rentuútreiðslur | 2.813.000,00 |
| Útreiðslur til rentustuðul | 2.650.000,00 |
| **Útreislur íalt** | **140.472.000,00** |
| | |
| **Úrslit** | **17.643.000,00** |
| | |
| **Íløgur** | **42.610.000,00** |
| | |
| **RLÚ** | **-24.967.000,00** |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Fíggjarnevnd 22. mai 2026**

Verður viðgjørt á einum seinni fundi áðrenn býráðsfundin

**Fíggjarnevnd 26. mai 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at góðakenna fyriliggjandi roknskap.

**<u>Býráðið 27. mai 2026</u>**

Roknskapurin einmælt samtyktur.

## 34/26 Eykajáttan apríl 2026 - 26/00225

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 11/26 | 26/00225-2 |
| 2 Býráðið | 29.04.2026 | 28/26 | 26/00225-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 26/26 | 26/00225-2 |
| 4 Býráðið | 27.05.2026 | 34/26 | 26/00225-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir íløgur og frágreiðing frá umsitingini.<br><br>Sum tað framgongur av fyriliggjandi yvirliti, so er talan um at veita eykajáttan á 1.520.000,00 kr., Allar eykajáttaninar eru til íløgur, sum vóru avsettar í fjør men sum ikki vóru gjørdar liðnar í fjør , men verða gjørdar liðnar í ár.<br><br>À býráðsfundinum tann 26. februar var samtykt at taka av tilboðið á 900 t.kr til liðugtgerð av tangahúsinum við skúlan í Leirvík, og er neyðugt at veita eykajáttan til hetta.<br><br>**Ískoyti 28. apríl 2026.**<br>Víst verður til fyriliggjandi skriv frá umsitingini (Aðrar viðmerkingar), har greitt verður frá at neyðugt er at veita eykajáttanir umframt omanfyristandandi á 4,2 mió. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| RLÙ verður 1,5 mió. betri enn ætla í 2025, men 2,4 mió. verri í 2026<br><br>**Ískoyti 28. apríl 2026**<br>RLÚ fyri 2026 verður 6,6 mió. verri í 2026 í mun til samtyktu fíggjarætlanina. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti, um framt ískoyti dagfest 28. apríl 2026. Altso á íalt 6,6 mió. |

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttanir á íalt 6,6 mió. Peningurin verður tikin av innistandandi.

**Býráðið 29. apríl 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**<u>Fíggjarnevnd 22. mai 2026</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð

**<u>Býráðið 27. mai 2026</u>**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

## 35/26 Nýggj moldgoymsla - matr. nr. 335 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.05.2026 | 17/26 | 26/00255-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 27/26 | 26/00255-3 |
| 3 Býráðið | 27.05.2026 | 35/26 | 26/00255-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur í eina tíð arbeitt við at finna eitt hóskandi øki til framhaldandi tyrving av tilfari og goymslu av mold frá útstykkingum í kommununi. Verandi goymsluøki er nú fult, og tí er alneyðugt hjá kommununi at fáa eitt nýtt øki til endamálið.

Í hesum sambandi hevur kommunan kannað møguleikan fyri at nýta eitt øki í hagapartinum oman fyri Heiðar í Syðrugøtu, matr. nr. 335, til nevnda endamál. Ætlanin er, at økið skal skipast sambært viðfestum skjølum, og talan er um eina langtíðarætlan. Mett verður, at økið innan fyri ætlaða vegkassan hevur eina nýtslutíð upp á umleið 20 ár.

Mett verður, at hetta økið hóskar seg sera væl til ætlanina hjá kommununi, bæði vegna staðseting og lendiseginleikar, umframt at tað liggur nær við økið, ið kommunan áður hevur nýtt til sama endamál.

Ætlanin er at nýta verandi vegin til gomlu moldgoymsluna og gera eina íbinding til nýggja økið. Vegastrekkið millum matr. nr. 238 og 200 verður longt niðan í hagan og staðsett soleiðis, at hóskandi hædd fæst til tyrving. Vegkassin verður umleið 3 m breiður og fær eina tjúgd á umleið 50 cm av drenandi og berandi tilfari. Vegurin skal vera útgjørdur til at tola tunga ferðslu.

Arbeiðsøkið til tyrving og moldgoymslu verður avbyrgt, og ábyrgdarpersónur verður settur at umsita móttøkuna á økinum. Maskina verður staðsett á økinum og skal leggja tilfarið út. Skráin verður gjørdur frá einari hæddarlinju á umleið 150 m niður móti 140 m og nakað niðan fyri hetta. Arbeitt verður stigvíst suðureftir, og skráningarnir verða liðugtgjørdir so hvørt.

Serlig atlit verða tikin til verandi hagagrót í økinum. Stórt hagagrót verður varðveitt á staðnum sum ein natúrligur partur av landslagnum, meðan smærri hagagrót verður savnað saman og skipað lagt á økinum, soleiðis at tað ikki verður tyrvt undir.

Somuleiðis verða serlig atlit tikin til avrenning og vatnrensl í økinum, soleiðis at vatn í lendinum kann renna ótarnað. Tilfarið, ið verður tyrvt, fevnir um mold, eyri, grót og annað tilfar, ið er hóskandi til tyrving. Eftirlit verður hildið við, at einki ólógligt ella óviðkomandi burturkast verður lagt á økið.

**Arbeiðsætlan:**
Økið verður ikki bygt út í einum, men stigvíst eftir tørvi. Niðankoyringin og vegurin niðan á hæddarlinjuna 150 m verða gjørd í einum, og síðani verður vegurin longdur stigvíst suðureftir. Harumframt verður neyðugt at seta niður rulluportur fyri at forða fyri, at seyður sleppur millum innangarðs og uttangarðs jørð.

**Skjøl:**

| |
|---|
| • Lendismátingar við moldgoymsluna í Syðrugøtu tann 21. apríl 2026<br>• Nýggj moldgoymsla í Syðrugøtu |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 1.000.000,- |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at játta omanfyri nevnda verkætlan og at avseta neyðugan pening til hetta arbeiði. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. maj 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 27. mai 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarksipanarnevndini og fíggjarnevndini

## 36/26 Umsókn um loyvi at keypa ískoytisstykki - Leggja ag aftrat 319 í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.03.2026 | 11/26 | 26/00083-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2026 | 6/26 | 26/00083-3 |
| 3 Býráðið | 29.04.2026 | 16/26 | 26/00083-3 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.05.2026 | 18/26 | 26/00083-3 |
| 5 Fíggjarnevnd | 22.05.2026 | 28/26 | 26/00083-3 |
| 6 Býráðið | 27.05.2026 | 36/26 | 26/00083-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp av matr. nr. ag í Leirvík, dagfest 10. februar 2026.

Søkt verður um loyvi at keypa matr. nr. ag í Leirvík sum ískoytisstykki til matr. nr. 319 í Leirvík. Matr. nr. ag í Leirvík er áleið 488 fermetrar til støddar.

**Lógir og ásetingar:**

Í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn í § 2, stendur:

**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á ella
4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini:**

Ein partur av matr. nr. ag í Leirvík verður nýttur sum vegur og virkar sum atkoma til matr. nr. 437 og matr. nr. 436.
Um kommunan selur allan matr. nr. ag í Leirvík, kann hetta hava við sær, at eigararnir av omanfyri nevndu matriklum missa sína atkomu til ognina. Harumframt vil kommunan ikki hava møguleika at víðka vegin í framtíðini.

Umsitingin hevur tí gjørt eitt uppskot um, hvønn part av matr. nr. ag í Leirvík kann seljast sum ískoytisstykki til matr, nr. 319 í Leirvík. Sambært hesum uppskoti kann ein partur, svarandi til umleið 155 fermetrar, seljast. Sí skjal 26-00083, fylgiskjal 1.

Skjøl í málinum:

- 26-00083 Fylgiskjal 1
- Uppískoytisstykkið

**Ískoyti 20.05.2026**
Býráðið kann geva frávik í sambandi við sølu av omanfyri nevnda øki við at broyta byggisamtyktina eftirfylgjandi, við heimild í hesi lóg:

Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. §.17 stk.2. geva undantaksloyvi til góðkendu byggisamtyktina.

*Stk. 2.* [1)] Verður tað í kommunustýrisins ummæli eftir § 20 ella á annan hátt upplýst, at tað við sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara reglunum í:

a) lóggávuni um byggi- og brunaviðurskifti,
b) eini góðkendari byggisamtykt ella býarskipan, ella
c) lóggávuni annars, kann sundurbýtið ikki verða góðkent uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| Ongar. |

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at selja part av matr. nr. ag í Leirvík svarandi til 155 fermetrar, sum víst á skjal 26-00083 Fylgiskjal 1.

**Ískoyti 20.05.2026**
Umsitingin mælir til at selja part av matr. nr. ag í Leirvík svarandi til 155 fermetrar, og broyta byggisamtyktina eftirfylgjandi.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 18. marts 2026</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. apríl 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 29. apríl 2026**
Málið tikið av skrá

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. maj 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin.

**Býráðið 27. mai 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 37/26 Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 120 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.04.2026 | 15/26 | 26/00229-2 |
| 2 Býráðið | 29.04.2026 | 29/26 | 26/00229-2 |
| 3 Býráðið | 27.05.2026 | 37/26 | 26/00229-2 |

**Málslýsing:**

**Uppruni til málið:**
Eysturkommuna hevur tann 22.04.2026 móttikið umsókn um útbygging av sethúsum á matr.nr. 120 í Syðrugøtu.

**Lýsing av málinum:**
Umsóknin fevnir um útbygging av verandi sethúsum á omanfyri nevnda matrikli.
Útbyggingin verður framd omaná verandi kjallara, ið er bygdur í mark, og umfatar eina víðkan á umleið 41,4 fermetrar í mun til verandi bygning.
Byggimarkið vendir út móti ánni, og frástøðan til grannahúsið er 13,3 metrar.

**Lógargrundarlag, ásetingar o.a.:**
Ognið er staðsett í einum B-øki, ið er lagt út til bústaðarendamál. Umsøkta útbyggingin er í samsvari við galdandi hæddaravmarkingar og byggistig, ið er ásett til 0,3. Eftir útbyggingina verður byggistigið 0,28.

**Skjøl í málinum**

- Byggiloyvi út á mark á matr 120 Syðrugøta

**Ískoyti 28.05.2026**
Umsóknin um byggiloyvi á matr. nr. 120 í Syðrugøtu hevur verið til granna hoyring hjá eigarunum av matr. nr. 24, 134 og 77 í Syðrugøtu. Freistin at koma við viðmerkingum var 20. mai. 2026, og ongar viðmerkingar eru komnar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at geva frávik til hesa útbygging.

**Ískoyti 28.05.2026**
Umsitingin mælir til at geva frávik til hesa útbygging.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 22. april 2026</u>**
Uni Rasmussen tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Ann Fuglø tekur støðu á býráðsfundinum.

*Heri Mikálsson var úti undir viðgerðini vegna ógegni*

**<u>Býráðið 29. apríl 2026</u>**
Málið tikið av skrá

*Heri Mikálsson var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**<u>Býráðið 27. mai 2026</u>**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Magnus Skoralíð, Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Tórur Didrik Djurhuus, Uni Rasmussen

**Atkvøddi blankt:**
Ann Fuglø

*Heri Mikálsson var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

fundurin lokin kl. 20.30

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen